# er farin

hóast tilflytingin skjótt fellur niður á eitt normalt støði, so tekur fráflytingin dik á seg árunum 1989 til 1995. Í 1993 fóru 2.800, í 1994 fóru 3.300 og í 1995 fóru 2.300. Tilsamans hesi trý árini fóru 8.400 fólk av landinum ella umleið 18%. Hetta er eitt so stórt tal, at eg ikki havi funnið nakað annað, sum tað kann samanberast við.

So var tann versta kreppan hæsað av, og nógv fólk sum høvdu verið 'niðri' eina tíð, fóru so smátt at koma heim aftur. Fráflytingarnar hava verið í minking frá 1995 til 2001, men í 2002, 2003 og 2004 hækkaði talið, ikki so nógv, men tó eitt sindur. Sjálvt um endaligu tølini fyri 2004 ikki eru tøk enn, so kann væntast at tað gevur eina nettoflyting av landinum fyri fyrstu ferð í 8 ár. Frá januar til oktober í ár var nettoflytingin minus 137 fólk.

## Kreppuárini eru ikki vunnin inn aftur

Í tíðarskeiðinum 1970-88 var at kalla javnvág millum til- og fráflyting, og nettoúrslitið hesi 18 árini var + 312 fólk. Næsta skeiðið 1989-95 var tann lívshóttandi kreppan, sum gav eitt stórt negativt tal í flytingini, netto minus 7.192 fólk. So kom ein stabiliseringsperioda, sum politiskt fyri ein stóran part bleiv brúkt til at byggja luftkastellir. 1996-2004 gav eitt positivt nettoúrslit uppá +2.600 fólk.

Hóast nøkur burturav góð ár, sum nú eru farin, í hvussu so er fyri eina tíð, so bleiv tað sum fór fyri skeyti í kreppuárunum ikki vunnið inn aftur. Roknistykki vísir so, at 4.600 fólk komu ongantíð til Føroya aftur, men tey liva allarhelst væl og hava tað gott, har tey nú liva og virka.

## Fer fólkatalið nakrantíð upp um 50.000?

Seinasta mynd 3, vísir so hvussu úrslitið av øllum hesum tølum, sum eru umtalaði, vísa seg í fólkatalinum í Føroyum. Har var ein nokkso jøvn framgongd til 1989, tá meðalfólkatalið var 47.738. So kom eitt ordans høgg; og meðalfólkatalið fall til 43.556. Har næst kemur ein jøvn framgongd aftur, sum seinasta árið tó sýnist at hava mist kraftina aftur. Men um ársskiftið komandi kann fólkatalið í Føroyum væntast at liggja um 48.500. Mynd 3 kann eisini avlesast soleiðis, at kreppan kostaði samfelagnum so nógv, at tað tók tíggju ár at koma aftur á sama støði aftur. Spennandi verður at hoyra, hvussu annar táttur verður kvøðin.

## Komandi greinar

Í komandi greinum er ætlanin at taka upp aðrar part-2.ar av demografisku spurningunum, sum hava týdning í føroyska samfelagnum. Tað kundi verið tann sonevnda "eldra-byrðan" ella flytingar millum landspartarnar, útjaðaraspurning og kanska økismenning.

Keldur:
Árbók fyri Føroyar 2003
Heimasíðan hjá Hagstovuni
http://www.hagstova.fo/portal/page?_pageid=193,96058&_dad=portal&_schema=PORTAL







